Sosialurin
...títt vinnublað



VINNAN
VINNU- OG HANDILSTÍÐINDI Í SOSIALINUM

# Nýtt gassævintýr millum Hetland og Føroyar í eygsjón

GASSÆVINTÝR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin*




*Laggan gasskeldan liggur miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið. Total arbeiðir við eini ætlan at leggja eina gassleiðing frá Laggan til Hetlands. Henda íløga kann gerast gull verd fyri leiting á føroyska landgrunninum, finna vit gass í undirgrundini*

Franski olju- og gassrisin TOTAL er við at leggja síðstu brikkarnar í einum nýggjum og spennandi puslispæli ikki so langt frá føroyska markinum. Felagið, sum fyri mongum árum síðani fann fleiri minni gassfelt vestan fyri Hetland, er nú eftir øllum at døma til reiðar at fara undir at framleiða gass frá hesi nýggju gassprovinsini í Atlantshavi til tann svanga bretska og europeiska marknaðin.

Sambært Shetland Times hevur Total gjørt av at brúka umleið fýra milliardir krónur at byggja eitt nýtt gassvirki nærhendis Sullom voe terminalinum í Hetlandi. Henda avgerðin, skrivar blaðið á síni heimasíðu, kemur eftir at felagið hevur gjørt av at gera eina íløgu uppá 18 mia. krónur at leggja eina gassleiðing frá Laggan gassfeltinum til lands í Hetlandi, áðrenn tað verður flutt víðari til St Fergus á skotska meginlandinum.

Nýggja gassvirkið í Hetlandi fer at skapa meira enn 100 nýggj arbeiðspláss næstu árini og umleið 60 varandi arbeiðspláss á gassterminalinum. Arbeiðið er ætlað at byrja næsta ár og byrjar framleiðslan í 2013 skrivar Shetland Times.

Ovasti leiðarin í Hetlandi, Sandy Cluness tók sera væl ímóti tíðindunum og segði, at hetta fer at halda gassterminalinum gangandi í 20 til 30 ár.

Rørleiðingin kann eisini skunda undir aðrar útbyggingar vestan fyri Hetland, sum er ein av fáu ótroyttu kolvetnisregiónunum.

Portalurin skilur, at enn hevur Total tó ikki endaliga gjørt av at fara undir verkætlanina, tí enn restar at fáa okkurt uppá pláss. Annars hevur bretska stjórnin saman við oljufeløgum skipað ein arbeiðsbólk við tí endamáli at fáa gongd á gassframleiðslu vestan fyri Hetland. Fleiri gassfund eru gjørd men meginfortreytin fyri at fara í gongd er at finna eina loysn á infrastrukturkervinum. Total, sum er tað leiðandi felagið, tá tað snýr seg um gass í hesum økinum, hevur ætlanir um sjálvt at fara í gongd heldur enn at bíða eftir eini felags loysn fyri øll gassfeltini í økinum. Helst verður endalig avgerð tikin í næstum. Sí eisini samrøðu við leitistjóra hjá Dong á síðu 24.

**Demich P/F Tórshavn**
Postboks 378 - Stíðjagøta 2
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 309 310
demich@demich.fo

**Demich P/F Vágur**
Á Marknoyri
FO-900 Vágur
Telefon +298 37 35 35
demich@demich.fo

**Demich P/F Runavík**
Heiðavegur 80
FO-610 Saltangará
Telefon +298 445500
demich@demich.fo

VØLUND VARMETEKNIK





HITI • VENTILATIÓN • SANITET

Vit hava røttu loysnina til júst tín tørv.

Umhvørvisvinarlig orka við hitapumpu frá Demich

demich